# Hygg og Hoyr

## Sjónvarp Føroya

Capone og Iris (Susan Blakely)

Fríggjadagin kl. 22.30:

### Capone

Hetta er amerikanskur filmur frá 1975. Ben Gazzara spælir Al Capone, John Cassavetes spælir Frankie Yale og Sylvester Stallone Frank Nitti. Capone var leigu-drápsmaður í Chicago í tjúgunum, men gjørdist seinni størsti brotsmaður í Amerika til hann doyði hálvavegna sinnissjúkur av syfilis.

Leygardagin kl. 20.30:

### Guinness heimsmet

**Lívbjargarar**

Munnu djørvu australsku menninir sleppa í víðagitnu bókina? Kemur sviskumeistarin? Peter Dowdsdell hevur met í at eta 144 sviskur uppá 65 sek., og nú ætlar hann at royna somu nøgd, men skjótari. David Frost leggur sendingina til rættis.

David Frost

Lagt til rættis
Ella Smith Clementsen
Hittist á tlf. 156 16

Leygardagin kl. 22.25:

### Rio Bio



Hans Otto Bisgaard

Nýggj undirhaldssending hjá Hans Otto Bisgaard. Hann er farin inn í eina gamla biohøll, og hadani skulu vit hoyra góðan tónleik, síggja filmskut o.a.

Sunnudagin kl. 14.35:

### Juliane

Filmur frá Peru um Julionnu, sum er móð av at búgva hjá fosturpápa sínum, tí hann er einki góður við hana, og hjá mammu síni, sum er sjúk. Hon vil heldur sleppa heimanífrá eins og lítli beiggi hennara, sum rýmdi, og sleppa upp í ein »banda«. Men teir vilja bert hava dreingir . . .

Sunnudagin kl. 19.35:

### Manna millum

Tróndur Patursson hevur gjørt nakrar linoliumstekningar av teimum mest vanligu hvalasløgunum, ið eru í Norðuratlantshøvum. Hesar tekningar verða prentaðar á gamlari blaðpressu ein og ein. Á ferð síni miðskeiðis í sjeyti árunum við húðarbátinum Brendan, kom Tróndur nær at hesum risadjórum. Tróndur sigur frá hesum upplivingum í sambnadi við hvalatekningarnar.

Vitjað verður á Ellisheiminum í Vágum. Vit síggja tey gomlu royna nýggja bussin, fáa stutt prát við onkran teirra.



Vit hitta nevndina, ið hevur givið bussin, og støkka inn á gólvið hjá einum gevara, ið gjørdi tað møguligt at keypa bussin so skjótt.

Sunnudagin kl. 21.00:

### Kontrapunkt

Svøríki og Ísland. Vertur er Sixten Jordstrøm. Yvirdómari Jens Østergaard.

Sunnudagin kl. 22.40:

### Fernisering

Sjónvarpsleikur um tjekkiska forsetan Vaclav Havel, og tað sum hendi honum í 1976.

Hjúnini Vera og Michael hava boðið gamla vinmanninum Bedrich at koma at síggja nýggju íbúð teirra. Men Bedrich, sum er ein fátækur rithøvundur, dugir ikki at síggja, hvussu gott tey hava tað.

Týsdagin kl. 21.15:

### Eitt pláss í sólini

27. februar fylti Elizabeth Taylor 60 ár og í hesum sambandi sendi TV2 eina sendirød av filmum hjá henni gjøgnum 45 ár. Fyrsti filmurin er frá 1951 og snýr seg um kærleikan millum eina unga, ríka kvinnu og systkinabarn hennara.

Montgomery Cliff og Elizabeth Taylor

Hósdagin kl. 21.55:

### Mynd av einum hjúnabandi

Seinasti partur av sendirøðini um Violet og Vitu og menn teirra, Harold og Denys. Kvinnurnar báðar gera av at gera álvara av dreymi teirra — at liva saman. Eisini sjálvt um hetta elvir til stórar broytingar hjá teimum øllum — ikki minst hjá Harold og dreingjunum báðum. Men Harold og Denys gevast ikki so . . .

### Morgunlestrar
**í Útvarp Føroya**

**23.—28. mars.**

**Hesa vikuna lesur Magnus Høgenni í Hvannasundi**

**Sálmar:**

**Mánadagur 30. mars**
nr. 173 Klettur, klovin fyri mær
nr. 64 Jesus til várt sálargagn

**Týsdagur 31. mars**
nr. 523 Ein fagur vegur er hjá teim

**Mikudagur 1. apríl**
nr. 36 Himlafaðir, gløgt tú kennir
nr. 558 Faðir, fylg mær henda dag

**Hósdagur 2. apríl**
nr. 211 Páskablóma, hvat vilt tú

**Fríggjadagur 3. apríl**
nr. 213 Til Emmaus fram leiðin bar

**Leygardagur 4. apríl**
nr. 216 Frøi er í himli høga

Lýsið í sosialinum